EUROPA CUP
**DYSTARSKRÁ 2 / 2022**

# H71

FRÍGGJADAG/SUNNURDAG
**4.-6. NOVEMBER**



## EUROPA CUP:

**MENN: Fríggjadagin 4. november**

**KL.18.00: H71- RK Partizan**

**MENN: Sunnudagin 6. november**

**KL.18.00: RK Partizan - H71**

sms · SUÐUROYAR SPARIKASSI · ARTICON · WENZEL.FO · BÓNUS · INTERSPORT Thomas Dam ítróttur · BYGMA BALSLEV · TRYGD · ADVOKATFELAGIÐ



ANNA DAM, FORKVINNA Í H71

# SO ERU TAÐ MENNINIR!

*Anna Dam, forkvinna í H71*

*Seinnu árini hevur tað verið siðvenja hjá H71, at vit senda bestu mans- og kvinnulið okkara út í Europa at kappast, og so er eisini í vetur. Kvinnurnar hava spælt sínar fyrstu dystir og nú eru tað menninir, ið skulu royna seg.*

Stutt sagt, so snýr ítróttur seg um avbjóðingar. Í dysti bjóðar tú mótstøðuliðnum av, men bæði í dysti og venjing ræður eisini um at bjóða sær sjálvum av. Tað er einasti vegurin til framgongd, sum aftur er einasti vegur til støðugt at røkka sínum settu málum.
At okkara spælarar elska avbjóðingar, vita bæði vit og onnur, tí bæði kvinnur og menn okkara, eins væl og gentur og dreingir okkara, eru allan vegin uppeftir uppvand til at taka við teimum avbjóðingum, tey møta á leiðini.
Sum felag ræður eisini um at fara eftir avbjóðingum, tí hóast tað eru venjingartímar og teljandi dystir, ið skapa ítróttarligu úrslitini, má felagið sjálvt ganga undan og vísa hugburðin, vit so fegin vilja leggja niður í allar okkara spælarar, frá teimum yngstu til teir elstu.
Tí hevur tað verið púra natúrligt fyri H71 at taka við europeisku avbjóðingunum, ið tær geva okkara spælum møguleikan at royna seg á øðrum stigi, enn teir gera í dagliga spælinum. Hetta er við til at menna bæði spælarar og felag, tí hvønn einasta dyst og hvørja einastu kapping læra vit nakað nýtt.
Hinvegin er hetta ein sera kostnaðarmikil avbjóðing, ið als ikki hevði latið seg gjørt

uttan tann góða stuðulin frá vinnulívinum og øðrum, umframt at Tórshavnar kommuna hevur roynst okkum væl, fyri ikki at tala um stóra og munagóða súkklutiltakið í fjør, ið uttan iva verður endurtikið í ár. Eg eri ovfarin av og takksom fyri, at so mong hava tikið saman hendur fyri at hjálpa okkum, tá ið vit hava havt brúk fyri tí!

## Vaksa við uppgávuni

Nú eru tað sum sagt menninir, ið standa fyri tørni, eftir at kvinnurnar fyri trimum vikum síðani niðri í Eysturríki megnaðu at spæla seg víðari. Tær skulu spæla sínar næstu dystir fyrst í desember mánaði, tá ið tjekkiska stórfelagið, Slavia Prag, kemur hendavegin.
Eins og kvinnurnar, byrja menninir í sínum lagi á útivølli, nú teir í serbiska høvuðsstaðnum, Beograd, skulu spæla ímóti RK Partizan, ið er eitt av søguríkastu hondbóltsliðum í serbiskum hondbólti. Tað í sjálvum sær er ein stór avbjóðing.
Okkara lið er ungt og kanska ikki við so nógvum royndum sum tey, vit skulu kappast við, men vit hava higartil í ár sæð, at okkara er eldhugaðir og vilja fegnir taka lærdóm til sín, so teir gerast dugnaligari og dugnaligari. Sum vit so ofta hava sæð við H71, ivast vit heldur ikki í, at teir fegnir vilja vaksa við uppgávuni!
"Alle gode gange tre", verður so ofta tikið til, og tað vóna vit sjálvandi eisini, nú H71-menninir á triðja sinni royna seg úti í Europa. Lutakastini hava kanska ikki verið tey bestu hesi trý árini, men møguliga verður tað hesaferð, at tað eydnast at taka seg víðari til næsta umfar. Vit vóna tað besta!

## Eisini fyri onnur

Við at fara út at spæla europeisku kappingarnar, fáa vit bæði sera góð og minni mótstøðulið, so hóast tað kanska ikki altíð eydnast at vinna og koma víðari, kenna vit okkum altíð sum eitt slag av vinnara, tí vit fáa so nógv burturúr allíkavæl.
Ynskiligt hevði verið, at onnur føroysk feløg eisini tóku stigið, tí so kundu vit í felag verið við til at ment føroyskan hondbólt enn meira, samstundis sum ein kapping sum EHF Europa Cup er ein fínur pallur fyri okkara spælarar og somuleiðis ein sýnisgluggi, ið vísir, hvussu góður føroyskur hondbóltur er. Tað kunnu vit tó ikki gera nakað við, tí ta avgerðina eiga hini feløgini, men við at melda okkara lið til, royna vit so at gera okkara. Higartil hava vit bara verið nøgd og glað, so vónandi er hetta ein siðvenja, vit kunnu halda fram við í framtíðini eisini.
Í dag er støðan tann, at spælarar mestsum standa í bíðirøð at sleppa framat á landsliðunum, har venjararnir hava ovmikið av spælarum í at velja. Øll kunnu ikki spæla á landsliðnum, men tá eru europeisku dystirnir ein góður møguleiki at vinna sær altjóða royndir, ið so kanska næstu ferð gera leiðina til landsliðið tað styttri.


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
Ford
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni
gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá
føroyskum hondbólti
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO



# ID.3. Býður tær vælkomnum.
# Flytur teg inn í elheimin.
# **Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**



HILMAR JAN HANSEN

# H71 BERJAST ÍMÓTI “PARTISANUM”

*Hóast H71-venjarin, Simon Olsen, er greiður yvir, at serbiska mótstøðuliðið er favorittur, er hann við gott mót og vil hava sínar menn at avrika væl báðar dystirnar niðri í Beograd ímóti RK Partizan*

*Menninir, sum í EHF Europa Cup-kappingini skulu spæla ímóti serbiska RK Partizan, skulu spæla báðar dystirnar í Beograd, tann fyrra fríggjadagin 4. november og tann seinna sunnudagin 6. november*

Fríggjadagin og sunnudagin – báðar dagar klokkan 17, føroyska tíð – skal besta manslíðið hjá H71 fyri triðju ferð royna seg í EHF Europa Cup-kappingini. Fyrsta árið var mótstøðan RK Maribor Branik úr Slovenia, annað árið HK Drammen úr Norra og í ár er mótstøðuliðið RK Partizan Beograd úr Serbia.
At hetta er lið, sum er væl fyri, fortelur serbiska stigatalvan í løtuni, tí har eru “partisanarnir” nummar trý, umframt at teir síðstu tvey kappingarárini hava vunnið silvur. RK Partizan Beograd er søguliga sæð tað næstmest vinnandi í serbiskum hondbólti við níggju meistaraheitum og ellivu steypaheitum – fyrst í gamla Jugoslavia og síðani Serbia.
Heimavøllurin er Banjia Sport-høllin, ið tekur 2.500 áskoðarar, og tað verður har, báðir dystirnir verða spældir, tí soleiðis sigur avtalan, ið er gjørd millum feløgini.
So her er óivað eitt lið, ið ætlar sær at gera ein vørr á sínum egna heimavølli, har báðir dystirnir verða spældir.

## Truplir dystir

Hóast tað á pappírinum sær út til, at serbiska heimaliðið báðar dagarnar er greiður favorittur at spæla seg víðari, vil H71-høvuðsvenjarin ikki leggja seg flatan, men ætlar at fáa menn sínar at gera sítt besta bæði fríggjadagin og sunnudagin.

– Í øllum førum er eingin ivi um, at vit kunnu vænta okkum eina torføra uppgávu, tí vit skulu royna okkum ímóti einum sterkum serbiskum liði. Hetta verða tveir truplir dystir, har teir sjálvandi hava fyrimunin av at spæla báðar á sínum heimavølli, sigur Simon Olsen.

– Vit vilja sjálvandi sleppa víðari til annað umfar, so fyri okkara part fara vit at leggja størsta dentin á at leggja eitt gott avrik eftir okkum. Nú hava vit tvær ferðir verið við áður, og eisini hesa triðju ferðina halda vit fast í dreymin um at røkka annað umfar.

## Hava ungan hóp

Liðið er nógv broytt í mun til síðsta kappingarár, tí fleiri spælarar eru farnir uttanlands at royna seg, men Simon er vónríkur, tí hann heldur seg hava sæð góðar ábendingar í teimum trimum dystunum í landskappingini higartil.

– Sjálvandi arbeiða vit við tí liðnum, vit hava, og nú vit hava nógv nýtt fólk í bæði verju og álopi, eru vit greiðir yvir, at tað tekur tíð at byggja nakað upp. Men eg haldi, at tað gongur tann rætta vegin hjá okkum, sigur venjarin.

– Gamaní, er hópurin hjá okkum ungur, men samstundis er hann sera spennandi og har er nógv potentiali. Nøkur útsving hava verið, nú vit hava arbeitt við at fótað okkum sum lið á vøllinum, men vit royna alla tíðina okkara besta, og tað fara vit eisini at gera í europeisku avbjóðingunum.



*Í løtuni er RK Partizan triðfremst í landskappingini í Serbia og er annars søguliga sæð næstmest vinnandi mansliðið í serbiskum hondbólti.*


FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI
AnniJanni
















DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO


Vit raka málið!


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

fk




Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



# TRIÐJA EUROPEISKA AVBJÓÐINGIN

*Kvinnurnar spældu báðar sínar fyrstu dystir í Eysturríki og nú spæla menninir sínar báðar í Serbia. Men kvinnurnar spæla sín triðja og fjórða dyst í Føroyum, so vónandi fáa trúføstu áskoðarar okkara okkurt at gleða seg til tá.*

*So stendur aftur ein dystur í EHF Europa Cup-kappingini fyri framman hjá H71. Hesa ferð er tað fremsta lið hjá monnum, sum skal í eldin. Leiðin liggur eystur til Beograd í Serbia, har vit um vikuskiftið møta RK Partizan í europeiskum dystum. Spælast skulu tveir dystir og vera teir báðir spældir í Beograd.*

Sannast má, at hópurin, ið leggur frá landi í Hoyvík, er nakað ungur og óroyndur. Sum kunnugt, verður hjá monnunum arbeitt við at byggja upp ein nýggjan hóp frá botni, eftir at mestsum allir spælararnir á greipuvinnaraliðnum síðsta kappingarárinum eru antin seldir av landinum, skaddir ella givnir at spæla.
Liðið hevur tó staðið seg stak væl í heimligu kappingini higartil í ár og hevur vunnið tveir dystir, spælt tveir javnar og tapt tveir dystir tepurt. Í øllum landskappingardystunum hava teir verið væl við og hava ligið til at vinna allar dystir heilt fram til leiklok, og kunnu vit ásanna, at tað tað einamest eru vantandi royndir hjá liðnum, ið hava forðað okkum í at draga sigrarnar til hús allar ferðirnar. So samanumtikið má formurin á liðnum sigast at vera góður.

## Mótstøðan væl fyri

Hvat viðvíkur RK Partizan, so tykist teirra formur eisini at vera góður í løtuni. Sambært heimasíðu felagsins liggur liðið triðfremst í serbisku landskappingini og hevur 10 stig fyri seks dystir. Av teimum síðstu tíggju dystunum, serbiska høvuðsstaðarliðið hevur spælt, hevur tað vunnið teir átta.
Tað er soleiðis neyvan nakað at ivast í, at H71 kemur at møta sterkari mótstøðu í Beograd um vikuskiftið.

## Triðja europeiska árið

Annars hava lið hjá H71 nú í trý ár verið við í europeisku kappingunum. Fyrsta árið var bara mansliðið við, men síðstu tvey árini hava bæði menn og kvinnur spælt í europeisku kappingunum.
Skal takast saman um royndunum frá hesi luttøku, so er einki at ivast í, at europeisk luttøka er ein góð gularót fyri einstøku spælararnar, ið kann fáa teir at leggja meira í venjing sína, so teir kunnu sleppa upp í part í europeiskum dystum.
Eisini gevur slík luttøka spælarunum royndir, ið betra leikligu førleikar teirra. Og síðst, men ikki minst, so er tað sera inspirerandi fyri spælarar okkara at møta øðrum liðum enn teimum seks til sjey mótstøðuliðunum, teir kunnu møta í føroysku landskappingini, og sum teir undanfarin ár hava spælt ímóti upp í fleiri ferðir hvørt ár.

## Kvinnurnar væl í gongd

Serliga hava kvinnurnar gjørt sær royndir í europeiskari luttøku, havandi í huga, at tær hava staðið seg so sera væl higartil.
Í fjør spældu tær seg fram til fjórðingsfinalurnar, spældu tilsamans sjey europeiskar dystir, sum er púra óhoyrt í føroyskum høpi, og vunnu heili trý umfør. Í ár hava tær longu vunnið sítt fyrsta umfar og er ikki útilokað, at tær kunnu gera ein vørr í sínum øðrum umfari eisini. Harumframt er at kalla allur hópurin inntaktur og hevur ment seg síðstu trý árini, so royndirnar er varðveittar innanborða í hópinum.

## Hví ikki gott úrslit?

Hjá monnunum hava vit spælt við trimum leikhópum síðstu trý árini og verða europeisku royndirnar hjá einstøku spælarunum soleiðis fluttar av landinum, so hvørt sum mannligu leikararnir eru farnir út í heim at royna hondbóltseydnuna.
Óansæð royndir í undanfarnum europeiskum dystum ella ikki, so skulu spælarar okkara vera nærum meira enn klárir at tørna til ímóti RK Partizan í Beograd, um vit skulu gera okkum vónir um eitt líkinda úrslit.
Men tað er hent fyrr, so hví ikki eisini hesaferð?



| | |
|---|---|
| 1 | Rúna Jógvansdóttir Larsen |
| 2 | Elsa Egholm |
| 4 | Brynhild Pálsdóttir |
| 5 | Vár Bentsdóttir Zachariasen |
| 6 | Bjørk Brimnes |
| 7 | Maria Halsdóttir Weyhe |
| 8 | Karin Egholm |
| 9 | Marita Mortensen |
| 11 | Lukka Arge |
| 12 | Alda av Skarði |
| 13 | Inga Maria Joensen |
| 14 | Sunniva Bogadóttir |
| 15 | Christina Turiðardóttir Arge |
| 17 | Lív Bentsdóttir Zachariasen |
| 25 | Sára Jacobsen |
| 27 | Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe |
| 29 | Poula Fríðheim Petersen |
| 77 | Jana Mittún |
| 99 | Guðrið Bogadóttir á Borg |

**Venjari:** Benjamin R. Christiansen
**Hjálparvenjari:** Jon Arne Kamsvåg
**Liðleiðari:** Beinta Lindberg Hansen
**Málmansvenjari:** Alexander Lein Martinsen
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen

sms

## SMS KAPPINGIN - KVINNUR

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Kyndil | 5 | 155 | 116 | 39 | 9 |
| **2.** | **H71** | **5** | **165** | **108** | **57** | **9** |
| 3. | Stjørnan | 5 | 149 | 129 | 20 | 8 |
| 4. | Neistin | 5 | 131 | 116 | 15 | 6 |
| 5. | Víf | 5 | 129 | 141 | -12 | 4 |
| 6. | VB | 5 | 106 | 134 | -28 | 3 |
| 7. | Stíf | 5 | 101 | 145 | -44 | 1 |
| 8. | EB | 5 | 105 | 152 | -47 | 0 |



1 Torstein Sivertsen
2 Sveinur Olafsson
5 Rói Seyer Hjaltason
7 Baldur Gillason
8 Tórmóður Petursson Djurhuus
9 Jón Rói Mohr Høgnesen
10 John Skaalum Vilhelm
15 Ragnar Karlsson
18 Sakir Tróndarson Frýdal
21 Høgni Højsted
23 Ári Rúnason
28 Rói Ellefsen á Skipagøtu
30 Poul Símun í Garði
31 Rói Heinason Thomsen
39 Rókur Ziskason
45 Peter Krogh
50 Alexander Lein Martinsen
71 Bogi Hansen

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Petur O.Sivertsen

BURN
FITNESS

## BURN KAPPINGIN - MENN

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Víf | 6 | 173 | 158 | 15 | 11 |
| 2. | Kíf | 6 | 174 | 160 | 14 | 1+ |
| **3.** | **H71** | **6** | **161** | **157** | **4** | **6** |
| 4. | Team K. | 5 | 137 | 140 | -3 | 4 |
| 5. | Stíf | 4 | 121 | 115 | 6 | 3 |
| 6. | Neistin | 5 | 129 | 153 | -24 | 2 |
| 7. | Kyndil | 6 | 144 | 156 | -12 | 2 |

# EGINSTUÐLAR

FAROE SHIP

Fønix

strandamáling

Eydnudeild

FØROYA TELE

PRISMA

Samverk

ADVOKATSKRIVSTOVAN

RASKA
·1977·

BILLUTIR

LAKKERING

LIMO

FIXA
PERSÓNBILAR | LASTBILAR | HÚSVOGNAR

ADVOKATFELAGIÐ

SMYRIL LINE

polyplast

LBF

LAIDERZ
*Fokus á ítróttavøllir & breytir*

THE BIRD | GUESTHOUSE

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SALMON PROTEINS

bilrokt.fo

formula

OY

SPEKT

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn



HILMAR JAN HANSEN

# HÁKUN TIL TÝSKU BUNDESLIGUNA

*Ikki minst hevur Hákun West av Teigum imponerað komandi felag sítt við avrikunum í EHF Europa League-dystunum fyri Skanderborg Aarhus Håndbold.*

*Næsta kappingarár spæla tveir hoyvíkingar og føroyskir landsliðsspælarar at síggja í bestu týsku deildini, ið vanliga verður kosin heimsins besta hondbóltsdeild, tí tá kunnu vit uppliva bæði Hákun West av Teigum og Elias Ellefsen á Skipagøtu millum mongu stórspælararnar í Bundesliguni.*

Næsta kappingarár verður okkara Hákun West av Teigum at síggja í bestu týsku hondbóltsdeildini, nú hann hevur gjørt sáttmála við oddaliðið, Füchse Berlin. Longu frammanundan er greitt, at ein annar av okkara, Elias Ellefsen á Skipagøtu, eisini verður at síggja í Bundesliguni, tí hann herfyri skrivaði undir við THW Kiel.
Við øðrum orðum verða tveir hoyvíkingar at síggja millum fleiri av heims-

ins bestu hondbóltsspælarum, og skuldi nakar ivast í, hvat føroyskir landsliðsspælarar megna, so er bara at vísa á teir báðar, ið veruliga hava gjørt vart við seg.
Sjálvur ásannar Hákun, at tað hevur verið dreymur hansara, síðani hann byrjaði at spæla hondbólt, at hann skuldi koma í Bundesliguna. At tað so gjørdist Füchse Berlin, hevur nakað við tað at gera, at tað er eitt gott lið við nógvum góðum spælarum.
– At flyta til Füchse Berlin er sjálvandi spennandi, og eg gleði meg nógv til bæði at spæla og búgva í Berlin. Í løtuni er felagið á odda á stigatalvuni og sostatt eisini avgjørt eitt av toppfeløgunum í Bundesliguni, sigur Hákun.

## Góð orð á vegnum

Tað hevur leingi verið greitt, at lámi høgrivongurin hevur serstakliga góð evni og helst telist millum teir allarbestu, so tí er einki at siga til, at hann fær góð orð á vegnum, nú yrkisleiðin heldur fram í heimsins bestu hondbóltsdeild.
Stjórin hjá Hákuni í Skanderborg Aarhus Håndbold, Mads Lind, fegnast eisini Hákunsa vegna og sigur hann hava ment seg øgiliga nógv hetta hálvtannað árið, hann hevur verið í felagnum, og at tey har eru errin av, at ein av teirra spælarum fer víðari til eitt av bestu liðunum í Bundesliguni.
– Tað harmar okkum at missa Hákun, men samstundis eru vit errin av, at vit kunnu senda ein spælara víðari til eitt so framstandandi felag sum oddaliðið í Bundesliguni júst nú, sigur hann og leggur afturat, at Skanderborg Aarhus Håndbold eisini ment seg, so felagið kann lata spælarar til "ovastu altjóða hillina", sum hann tekur til.
Sjálvur hevur Hákun eisini givið til kennar, at skuldi hann blivið verandi í Danmark, so hevði hann hildið fram í Skanderborg Aarhus Håndbold, sum eisini fer at hugsavna seg um til fulnar restina av kappingarárinum.
– Men tá ið eg nú fekk henda spennandi møguleikan í Füchse Berlin, kundi eg heilt einfalt ikki siga nei, tí hetta mátti eg bara royna. Bundesligan hevur eina harða og tætta dystarskrá, og eg gleði meg til at fáa ment mítt spæl enn meira har, sigur Hákun West av Teigum.

## Týskarar spentir

Eisini høvuðsvenjarin hjá Füchse Berlin, Jaron Siewert, fegnast um at hava fingið Hákun til felagið og sigur, at hann sær fram til ein ungan og dynamiskan spælara, sum longu hevur givið til kennar, at hann kann menna seg enn meira. Tí hevur felagið gjørt sáttmála við Hákun um kappingarárið 2023/24.
– Eg eri vísur í, at vit við Hákuni hava fingið undirskriftina frá einum svongum spælara, ið góðtekur, at kapping er um hansara pláss, sigur




*Fyrsta kappingarárið á besta liðnum hjá Skanderborg Aarhus Håndbold skjeyt Hákun 38 mál og eitt ár seinni er hann longu komin upp á 98 mál higartil í kappingini*

venjarin og vísir á, at tá ið Füchse Berlin og Skanderborg Aarhus Håndbold møtast í EHF European League-kappingini um ein mánað, fer Hákun at fáa eitt betri inntrykk av sínum komandi heimavølli, Max-Schmeling-Halle í týska høvuðsstaðnum.
Somuleiðis sigur ein av nevndarlimunum í týska felagnum, Stefan Kretzschmar, at sáttmálin við Hákum er eitt signal fyri framtíðina: – Eg havi fylgt við honum í longri tíð og eri bergtikin av hansara evnum, men eisini teknisku førleikum hansara á høgra vongi, sigur hann og leggur afturat, at tað í framtíðini verður spennandi at síggja bæði Hákun og hin høgravongin, Valter Chrintz.
Ikki minst hava tey í Füchse Berlin fest seg við, at Hákun sum bara 16 ára gamal flutti úr H71 til Danmarkar fyri at menna seg sum spælari. Fyrsta kappingarárið á besta liðnum hjá Skanderborg Aarhus Håndbold skjeyt hann 38 mál og eitt ár seinni er hann longu komin upp á 98 mál higartil í kappingini.
– Hansara fyrsti dystur í EHF Europa League-kappingini var eisini imponerandi, tí hann í 30-27 útisigrinum á makedonska Eurofarm Pelister var toppskjútti við ellivu málum, og nú aftur í dysti í Düsseldorf ímóti ukrainska meistaraliðnum, Zaporizhschja, ið nú av krígsávum spælir í næstbestu týsku deildini, skoraði upp á allar sínar møguleikar og skjeyt seks mál, sigur Füchse Berlin um sín komandi spælara.



*Hákun og hinir á føroyska landsliðnum gera góða reklamu fyri føroyskan hondbólt, og hondbóltsheimurin leggur óivað til merkis, at nú eru tveir føroyskir landsliðsspælarar í heimsins bestu hondbóltsdeild*



# VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI

*Alt til* ***HITA SANITET & VENTILATIÓN***

# Maria Poulsen & Co

**Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000**




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

FAROE SHIP


Mynd: Gudmund Helmsdal
LAIDERZ
Fokus på sportsfaciliteter
HOYVIKSVØLLURIN
Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.
JUTA MASTER 40/200 á EL25



www.laiderz.dk


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
sendistovan
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

Et her, tak við ella bílegg

# mál

**Máltíð til børn & vaksin**

*Salatbarr* **Kaffi** *Tvíflísar*

**Smurd rundstykkir**




*10 Miðal salatir*

**350,-**

Spar 50 kr

Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík, tel. 588256

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi   Hoyvíksvegur 67   FO-100 Tórshavn   Tel. 475000   ns@ns.fo   ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




©NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SKORA
VIÐ
SISU
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Friggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP